Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Ætlanin við landsins ognum í Hoydølum

Spurningar:

1. Hvat er endamálið við og sakliga grundgevingin fyri, at landsstýrismaðurin ætlar at lata landsins ognir í Hoydølum av hondum?

2. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er rætt og rímiligt at lata eina ogn og eitt friðað pláss í landinum, sum allir føroyingar eiga og hava atgongd til, burtur til endamál, ið kunnu gera hetta pláss, bygningar og lendi til privata ogn hjá einstaklingum, sum øll ikki hava atgongd til?

3. Kennir landsstýrismaðurin ikki ábyrgd av, hvat tær friðaðu Hoydalar í framtíðini verða brúktar til ?

4. Ætlar landsstýrismaðurin at leggja málið fyri Løgtingið at taka støðu til, áðrenn avgerð verður tikin í málinum ?

Viðmerkingar:

Landsstýrismaðurin hevur á tingi upplýst, at ætlanin er at gera eitt makaskifti um ognirnar hjá landinum í Hoydølum, so landsins friðaðu ognir á hesum plássi gleppa landinum av hondum.

Søgan um Hoydalar frá Sanatorii til skúla er flestum kend. Alt lendið er í mestan mun friðað, og fleiri ætlanir hava verið gjørdar um at gera lendið og bygningar alt meira atkomiligt til nýtslu hjá øllum fólki í landinum.

Tí verður spurt, hvat endamálið og grundgevingin er, og um landsstýrismaðurin ætlar at leggja málið fyri Løgtingið at taka støðu til.

Á Løgtingi, 6. august 2021

Høgni Hoydal